Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Súsanna Bertholdsen, løgtingskvinna

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Lønarlyft

1. Hvørji atlit eru tikin, tá avgerð varð tikin um, hvørjir starvsbólkar skuldu fáa lønarlyft?
2. Hvussu nógvar krónur meira um mánaðin fáa útvaldu starvsbólkarnir?
3. Hvussu hevur Fíggjarmálaráðið roknað seg fram til júst hesar upphæddirnar?

Viðmerkingar:
Í fleiri ár hevur verið ávarað ímóti stóra starvsfólkatrotinum innan umsorganarøkini, sum fer at raka sera meint, um einki verður gjørt; ein orsøk er lønarlagið.

1. januar 2024 hækkar lønin hjá hjálparfólkum, sum starvast innan barna-, almanna- og eldraøkið, hjá námsfrøðingum, hjá námsfrøðihjálparum, hjá heilsushjálparum og hjá heilsurøktarum.

Á Løgtingi, 15. desembur 2023

Súsanna Bertholdsen